vodafone **deildin**

**Tofta Ítróttafelag**
**B68**
**FO-650 Toftir**
**www.b68.fo**

**STOVNAÐ**
**21. desember 1962**

**FORMAÐUR**
**Jógvan Højgaard**

**MEISTARAR (3)**
**1984, 1985, 1992**

**STEYPAVINNARAR**
**ongantíð**

**GREIPUVINNARAR**
**ongantíð**

**Í BESTU DEILDINI**
**(2 ár)**
**1981-2004, 2006, 2008-**

**Í EUROPA (4)**
**Meistarakappingin 1993/94**
**Intertoto 1996/97, 2001/02, 2002/03**

# Bjartskygni er á Svangaskarði

**Hóast fleiri útskiftingar halda teir á Toftum vánir vera fyri betri úrsliti enn í fjør, tá ið B68 stóð seg betri, enn uppflytarar ofta gera**

Seinastu árini hevur tað verið nógv upp og niður hjá B68. Eftir at hava átt fast pláss í bestu deildini í tað mesta av einari fjórðings øld, hevur tað seinastu árini verið nógv upp og niður. Í fjør eydnaðist tað at halda tørn um plássið í bestu deildini. B68 endaði á 6. plássi, og harvið hilnaðist tað væl betur, enn tað ofta hevur gjørt hjá uppflytarum.

Bill Jacobsen, sum er annar av U-21 landsliðsvenjarunum, er ábyrgdarmaður á Svangaskarði. Hann telist millum fleiri evnaríkar og væl útbúnar venjarar í nýggjum ættarliði. Fleiri spælarar, sum í fjør áttu heimavøll á Svangaskarði, eru ikki longur partur av liðnum hjá toftamonnum, og nýggir eru komnir í teirra stað. Svarið hongur kanska upp aftur meiri í vindinum, enn tað ger hjá onkrum øðrum feløgum, hvussu tað man fara at hilnast hjá B68, men mótið sigst vera gott. Millum teir mest eyðsýndu, sum hava biðið farvæl á Svangaskarði, eru Jann Ingi Petersen, ið higartil bara hevur umboðað barndómsfelagið, og danski álopsspælarin Brian Andresen. Arnbjørn Danielsen er givin.

At liðið kanska hevur somu styrki, sum tey hevði í fjør, ella møguliga fer at standa seg betri enn so, kemst millum annað av tilgongdini: Poul N. Poulsen og Bogi Gregersen eru komnir av Skála og yvir um fjørðin, og so er Nenad Stankovic komin úr Runavík og út til grannarnar. Í fjør hilnaðist tað ikki so ógvuliga væl hjá serbanum, sum í 2007 var krumptappurin á FM liðnum hjá NSÍ, og sum árini frammanundan var høvuðsstrategur tey árini, tá ið tað gekk so væl á Skála, at tað var um reppið, at teir vunnu FM heitið.

Vlada Filipovic fer aftur at verja B68 málið. Tá ið tað eftir summarsteðgin í fjør hilnaðist væl hjá B68, vóru Pól Jóhannus Justinussen og Jóhan Dávur Højgaard miðverjar. Hvørgin teirra hevði royndir í hesum ódnunum, og báðir stóðu teir seg stak væl. 38 ára gamli Øssur Hansen er framvegis á liðnum, og millum aðrar royndar spælarar eru Kristian Anton Andreasen og Jóhan Petur Poulsen, sum í fjør var illa skaðaplágaður.

Í fjør vóru fýra senegalesar á Toftum. Tveir hava ikki fingið boð um at koma aftur. Ndende og Keita hava víst, at teir kunnu vera við til at styrkja liðið, og millum ungu menninar, sum eru uppvaksnir á Toftum, og sum stríðast fyri at sleppa framat, eru sera evnaríku Andre Olsen og Jóan Símun Edmundsson.




Seinnu helvt av kappingini í prógvaði B68 so ruddiliga, at teir eru aftur í fremstu deildini fyri at verða verandi
Mynd: Álvur Haraldsen

## Hópurin hjá B68:

**MÁLVERJAR**
Vlada Filipovic (Áður spælt Skála, VB/Sumba)
Petur Meinhard Magnussen

**VERJUSPÆLARAR**
Pól Jóhannus Justinussen (NSÍ, GÍ)
Øssur Hansen (B36)
Poul N. Poulsen (VB/Sumba, Skála)
Jóhan Petur Poulsen (NSÍ, Esbjerg)
Oddur Højgaard
Jóhan Dávur Højgaard (GÍ)
Niklas Joensen
Niklas Poulsen

**MIÐVALLARSPÆLARAR**
Ndende Adama Gueye
Nenad Stankovic (NSÍ, Skála)
Kristian Anton Andreassen
Dánjal Pauli Højgaard (ÍF)
Emil Olsen

**ÁLOPSSPÆLARAR**
Jóan Símun Edmundsson
Jonleif Højgaard
Bogi Gregersen (Skála)
Ameth Keita
Debes Danielsen (NSÍ, Skála, ÍF)
Andre Olsen

**TILGONGD**
Poul N. Poulsen, Skála
Nenad Stankovic, NSÍ
Debes Danielsen, ÍF
Bogi Gregersen, Skála

**FRÁGONGD**
Alex Troleis, Givin
Pape Landing Sambou, Senegal
Arnbjørn Danielsen, givin
Remi Langgaar, av landinum
Jann Ingi Petersen, NSÍ
Badara Diedhiou, Spania
Jacob Bymar, Varde IF

**VENJARI**
Bill McLeod Jacobsen

**HJÁLPARVENJARI**
Oddmar Andreasen